# Milan vil keypa Beckham

AC Milan tekur nú ítøkilig stig fyri at fáa eina varðandi avtalu í lag við bretska fótbóltsspælaran David Beckham, sum annars er sáttmálabundin við amerikanska felagið LA Galaxy. AC Milan hevur leigað Beckham úr LA Galaxy í tríggjar mánaðir, meðan amerikanska kappingin liggur still. Nú sigur AC Milan, at tað fer at seta seg í samband við LA Galaxy fyri at keypa Beckham.



# Arsenal vil hava Arshavin

Russiska felagið Zenit úr St. Petersborg váttar, at Arsenal hevur latið felagnum eitt alment boð upp á álopsspælaran Andrei Arshavin, men leiðslan í Zenit er ikki nøgd við boðið, sum var 85 milliónir krónur. Felagið sigur, at einki annað felag hevur boðið upp á Arshavin, og at tað skulu meira pengar enn teir, sum Arsenal hevur boðið, áðrenn felagið selir álopsspælaran. Nú sigst, at eisini Manchester City er áhugað í Arshavin.

# Trý nøvn eftir á listanum

**Kandidatarnir til landsliðsvenjarastarvið eru nú tríggir í tali. Annan hósdag ger FSF endaliga av, hvønn venjara teir fara í realitetssamráðingar við**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um ársskiftið boðaði FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu frá, at komandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti helst verður settur um mánaðarskiftið, januar-februar.

Og nú vit skriva 12. januar tykist hendan tíðarætlan at halda, sigur Høgni í Stórustovu.

- Um vit tosa kappróðrarmál, so eru málið gott og væl hálvt rógvið, og tríggir bátar hava togað seg undan restini, nú vit eru komnir móti einum av hesum molunum hjá Jógvani Arge.

Og ber til at siga, hvørjum bygdum hesir tríggir bátarnir eru úr?



*Tann 22. januar er ætlanin, at starvsnevndin hjá FSF skal seta navn á fremsta kandidatin sum føroyskur landsliðsvenjari*

- Tað fái eg ikki sagt í verandi løtu. Men talan er um eitt breitt felt, sum hevur umboðan úr trimum ymsum londum, sigur Høgni í Stórustovu.

**Avgerð um 12 dagar**

Takið komandi dagarnar hjá FSF er at fáa heilt neyvt at vita, um teir tríggir, sum nú eru á listanum, eru til reiðar at taka við, um starvið stendur teimum í boði.

- Vit hava sjálvandi samskift nakað við allar. Nú ræður um at staðfesta, at okkara krøv og ynski stemma við teirra ditto. Snøgt sagt at vita, um hesir eru til reiðar at koma til samráðingarborðið. Vit hava so starvsnevndarfund tann 22. januar, og tá er so ætlanin, at nevndin skal seta navn á tann, sum vit helst vilja hava, sigur Høgni í Stórustovu.

# Fær fríar teymar

**Starvið sum føroyskur landsliðsvenjari skal seljast sum ítróttarliga avbjóðandi heldur enn fíggjarliga gevandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er greiði boðskapurin hjá FSF, nú komið er til endaspurtin í landsliðsvenjarasetanini.

- Vit hava ikki pengarnar, sum veruliga kunnu lokka nakað stórt navn til Føroya. Men vit halda okkum kortini hava aðrar lutir, sum kunnu lokka røttu nøvnini til okkara, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

- Fyrst og fremst, so eru tað bara nøkur og háltrýsj landslið í Europa, so bara tað í sjálvum sær er ein stór avbjóðing.

- Og sum føroyskur landsliðsvenjari hevur tú eisini nakrar møguleikar, sum tú ikki hevur aðrastaðni. Ítróttarliga liggja vit niðarliga, sum er, og tí skuldu møguleikarnir verið góðir at skapt nøkur góð úrslit. Hartil hevur ein føroyskur landsliðsvenjari tann fyrimun fram um allar aðrar, at hann kann savna mest sum allar sínar spælarar upp á ein góðan tíma ella tveir. Og tað gevur møguleika fyri nøkrum heilt øðrum arbeiðsumstøðum, enn landsliðsvenjarar aðrastaðni eru vanir við, sigur Høgni í Stórustovu.

Saman við restini av starvsnevndini leggur Høgni í Stórustovu annars dent á, at ein komandi landsliðsvenjari eisini verður ein maður, sum kann ávirka meira enn bara A-landsliðið.

- Okkara ynski er, at vit fáa ein venjara, sum kemur at hava ábyrgdina av samlaða landsliðskonseptinum hjá føroyskum fótbólti. Hann sleppur at seta sítt egna venjaralið saman, og vit vóna sjálvandi, at hetta eisini verður av slíkum slag, soleiðis at tað kann virka til gagns fyri heimligu venjararnar eisini, sigur Høgni í Stórustovu.

Tað verður ikki sett sum krav frá FSF, at ein komandi landsliðsvenjari skal seta búgv í Føroyum. Men hann skal uppihalda seg í Føroyum stóran part av árinum, og soleiðis verður staðfest, at talan ikki verður eina loysn, har landsliðsvenjarin pendlar til oyggjar okkara við jøvnum millumbilum.

